# Samfelagstilvit 2019



FØROYA TELE

# Á veg inn í framtíðina

Vit eru á veg inn í eitt talgilt tíðarskeið við kollveltandi broytingum. Eitt tíðarskeið, har ið alt verður samanbundið og snilt orsakað av einum nýggjum ættarliði av kunningar- og samskiftistøkni. 5G, Tólnet, big data og tilgjørdur vitleiki eru nú drívmegin í sosiobúskaparliga vøkstrinum, og hetta nýggja ættarliðið gerst alsamt ein dagligur partur av okkara gerandisdegi.

Í dag er tøknilig nýmenning vorðin ein týdningarmikil drívmegi í alheimsbúskapinum. Og soleiðis er eisini heima í Føroyum. Á Føroya Tele raðfesta vit tøkniliga nýmenning og uppfinning.

Harumframt halda vit, at ein samanbundin heimur við snildari kunningar- og samskiftistøkni fer at gagna samfelagnum, vit liva í. Tá ið alt kemur til stykkis, so fer talgilda framtíðin, ið vit eru á veg inn í, at slóða fyri einum enn og grønari heimi.

Á Føroya Tele ynskja vit at slóða fyri framtíðini. Vit loyva okkum ikki at taka nakað annað fyri givið enn uppgávu okkara, sum er at røkja og menna eina so sterka, skjóta og nútíðarhóskandi samskiftistøkni sum yvirhøvur til ber. Bæði fyri einstaka føroyingin og fyri framburðin í okkara samfelag.

Ómaksleyst samskifti skulu allir føroyingar kunna taka fyri givið.

Fortreytin fyri ómakaloysi er tó, at fólk við góðum førleikum hvønn dag gera sær ómak, taka ábyrgd og hava dirvi til at framtíðartryggja eina sterka og nútíðarhóskandi samskiftistøkni, sum kann bera vaksandi ferðsluni, lúka nútímans krøv og nøkta tørvin hjá einstaka føroyinginum.

Hóast tøknin flytir seg skjótt, er tað tó umráðandi, at vit ikki leypa framav og missa fótafestið í samfelagnum, sum vit ynskja skal vera heimsins miðdepil, tá ið tað ræður um samskiftistøkni. Í síðsta enda er tað sosial tilvitska, ið fær alt annað at hanga saman.

Samfelagsábyrgd er ein náturligur partur av okkara gerandisdegi á Føroya Tele. Vit verja umhvørvið og seta tað í miðdepilin í øllum okkara virksemi, og tað fara vit altíð at gera. Tilvitanin um samfelagið er hugsað væl og virðiliga inn í okkara kjarnuvirksemi.

Eingin undantøk vórðu gjørd í 2019. Fyri okkum gjørdist árið enn eitt hendingarríkt ár, og vit løgdu nógv fyri at ganga okkara samfelagsábyrgd á møti.

Jan Ziskasen,
Samtaksstjóri



# Millum bestu farnet í heiminum



**Áhaldandi íløgurnar í landsumfatandi farnetið, sum er at meta millum tey bestu í øllum heiminum, tryggja, at møguleikin fyri góðum samskifti altíð er til staðar, sama hvar í landinum, vit eru stødd.**

Ómaksleyst samskifti skulu allir føroyingar kunna taka fyri givið, tí tað er treytin fyri at virka í heimssamfelag okkara, og tað er hesa uppgávu, ið ágrýtnu starvsfólk okkara greiða bæði dag og nátt.

Hetta hevur ført við sær, at okkara farnet er í avgjørdum heimsklassa og kann bera vaksandi ferðsluni, lúka nútímans krøv og nøkta tørvin hjá tí einstaka føroyinginum.

Sum liður í at varðveita støðuna, vórðu millum íløgur gjørdar í at uppstiga farnetið til 4G+ í 2019 á útvaldum økjum, har ið datanýtsla er hægst. Eisini varð arbeitt ítøkiliga við at gera dekningin enn betri í bygdum og býum í øllum landinum.

Góði landafrøðiliga dekningurin á farnetinum er ein góður tryggleiki fyri bæði føroyingar og ferðafólk, ið vitja vøkru oyggjarnar. Umframt at farnetið fevnir um allar tunlar í Føroyum, hevur umfatandi dekningurin eisini við sær, at ferðandi í fjøllum og á firðum kunnu reika trygt.

Í 2019 varð millum annað ein nýggj sendistøð sett upp á Víkum í Vágum. Umframt at tæna vinnulívinum í økinum, røkkur signalið frá sendistøðini heilt til Vestmannabjørgini, har ið nógv ferðandi eru; serliga í summarhálvuni.



Fyrsta fartelefonkallið á nýggju og framkomnu 5G-tøknini varð gjørt í høvuðssæti okkara í Hoyvík í juni. Síðani hevur verið arbeitt miðvíst við fyrireikingunum at útbyggja farnetið til 5G. Tøkniligar kanningar og greiningar eru gjørdar, men ein stórur partur av arbeiðinum hevur verið at tryggja grundarlagið undir nýggja 5G-netinum.

Handilskríggj og annað hevur merkt arbeiðið at avgera, hvønn veitara vit skulu velja. 5G er ein risaíløga í samfelagið, og tískil er tað umráðandi, at tryggasta og besta loysnin verður funnin; ikki bert her og nú, men langt inn í framtíðina.

## Hagtøl 2019

SMS-boð send

8.954.488

Minuttir tosaðir í fartelefon

63.706.651

GB av data brúkt

1.838.092


97,1%
Nýggjar og dagførdar sendistøðir

# Á beinari leið móti 100%

Stórar íløgur vórðu gjørdar í farnetið í 2019, tí á hvørjum ári er neyðugt at neyvstilla og menna netið, so at tað er í samljóði við tørvin hjá kundanum og framburðinum í samfelagnum sum heild.

Dekningurin er tann besti av sínum slagi í Føroyum, men einki er best, fyrrenn tað er 100%.

Í 2019 gjørdu vit nakrar ítøkiligar neyvstillingar og útbyggingar, so at farnetið nú dekkar 97,1% av øllum landøkinum í Føroyum.
Fleiri nýggjar sendistøðir vórðu settar upp fyri at bøta um dekningin í ávísum støðum, umframt at verandi sendistøður vórðu dagførdar við nýggjari tøkni fyri at bøta millum annað um innandura dekning.

- Í Havn vórðu sendistøðirnar á Hálsi og á Vaglinum neyvstillaðar og dagførdar til 4G+.
- Á Tvøroyri varð ein nýggj sendistøð sett upp fyri at bøta um dekningin miðskeiðis í bygdini.
- Í Klaksvík varð ein nýggj sendistøð sett upp við Stangabrúnna fyri at bøta um 4G og 4G+ í býnum.
- Á Víkum í Vágum varð ein sendistøð sett upp fyri at bøta um fartelefondekningin í økinum.
- Nýggj sendistøð varð sett upp fyri at bøta um dekningin inni í Hvannasundstunlinum.
- Hjá Bakkafrosti á Strond, hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri og hjá Luna á Fútakletti vórðu sendistøðirnar neyvstillaðar fyri at bøta um innan dura dekningin.
- Á Eggjarkletti í Nólsoy varð sendistøðin dagførd fyri at bøta um sjónetið umborð á Smyrli í Nólsoyarfirði- og Skopunarfirði.
- Í Villingardalstunlinum, Ritudalstunlinum og Kunoyartunlinum vórðu sendistøðirnar dagførdar á 800 Mhz-frekvensinum.





# KT-trygdarpolitikkur

## So hvørt sum heimurin gerst alsamt talgildur, og alsamt fleiri tænastur verða fluttar út á internetið, veksur tørvurin á einum tryggum kervi, ið dataferðslan ferðast á. Hetta er nakað, ið vit miðvíst arbeiða við og áhaldandi skipa virksemið hjá okkum eftir.

Allar skipanir, tænastur og mannagongdir virka eftir strongum trygdarkrøvum og verða regluliga granskoðarar eftir galdandi lógarkrøvum.

Eisini ganga vit á odda í strategiskum samstørvum við viðkomandi samstarvsfelagar fyri at virka fyri, at kundar, stovnar og fyritøkur í Føroyum kunnu virka undir tryggum talgildum kørmum.

**Samstarv við Føroya Politi og Gjaldsstovuna**
Við upplýsing og tøkniligum loysnum er endamálið við framhaldandi samstarvinum hjá okkum við Føroya Politi og Gjaldstovuna at hjálpa føroyskum stovnum, fyritøkum og einstaklingum at verja seg enn betur móti KT-álopum. Sum heild vil hetta styrkja KT-trygdina í Føroyum.

Grundarlagið fyri samstarvinum millum hesar tríggjar partar er skynsamt og týdningarmikið.

Sum stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, umsitur Gjaldstovan KT-trygdina í stórum parti av almenna KT- undirstøðukervinum, ímeðan Føroya Tele umsitur týðandi partar av øllum samskifti inni á landi. Løgreglan viðger møgulig ólóglig viðurskifti, so sum um roynt verður at bróta inn í KT-skipanir í Føroyum, og sostatt eru allir tríggir partar virknir viðleikarar í samstarvinum at styrkja KT-trygdina í Føroyum.



Óynsktir teldupostar steðgaðir

2.231.459

Teldupostar við virusi eyðmerktir og steðgaðir

4.763

Ferðir hava vit steðgað teldusníkum at rita seg inn á teldupostskipanir hjá føroyingum

34.569.101

Álvarslig DDOS* álop á skipanir, net og heimasíður eru steðgað.

8

* Distributed Denial Of Service

# Starvsfólkatrivnaður

## Hjá okkum á Føroya Tele eru dugnalig starvsfólk ein hornasteinur undir okkara virksemi, tí tey mynda okkara virksemi. At seta starvsfólkini í miðdepilin og leggja dent á starvsfólkatrivnað er ein natúrligur partur av okkara gerandisdegi.

Í meira enn 110 ár hevur Føroya Tele tænt føroyingum, og føroyska fólkið hevur verið hjartaslátturin í fyritøkuni. Men pulsurin í dag er ein heilt annar, og føroyska fólkið setir heilt onnur krøv í einum heimi, sum broytist dag frá degi, og kappingin er ein natúrligur partur av gerandisdegnum. Harvið hevur Føroya Tele ábyrgdina av at taka pulsin og tryggja, at starvsfólkini trívast í skiftandi umstøðunum.

**Dugnalig starvsfólk**
Hóast Føroyar eru staddar úti á opnum havi, eru vit í dag eitt framkomið samfelag, har landamørk og frástøða ikki spæla stóran leiklut. Vit røkka runt knøttin akkurát sum einki.

Vit arbeiða miðvíst við at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, so einstaka starvsfólkið er tilvitað um sín leiklut og um hvat verður væntað av teimum. Stevnumið okkara at tryggja, at starvsfólk trívast, eru motiverað og mennast, knýtir seg at okkara visjón at knýta Føroyar og føroyingar í eina betri framtíð.

Skulu vit ganga á odda í føroyska framburðinum, er raðfesting av starvsfólkatrivnaði ein fortreyt í mun til at tryggja ta góðskuni, ið kundin fær. Á hvørjum ári gera vit eina gjølla trivnaðarkanning og fáa greið úrslit, ið hjálpa okkum við miðvíst at skipa arbeiðið við starvsfólkatrivnaði.

**Útbúgving og samstarv**
Gjøgnum alt arbeiðslívið hjá einstaka starvsfólkinum eggja vit til áræði og ábyrgd við at virka fyri persónligari og fakligari menning. Um lívsumstøður hjá starvsfólkum og karmar hjá samtakinum geva grundarlag fyri tí, kunnu arbeiðskarmar skipast eftir ynski og tørvi hjá tí einstaka.

Vit miða støðugt eftir at skapa gjøgnumskygni í samtakinum og kveikja áhuga fyri okkara kjarnuvirksemi og harvið knýta møgulig framtíðarstarvsfólk at fyritøkuni. Hetta gera vit millum annað við tøttum tilknýti til skúlar, lærustovnar og fyritøkur.

Vit síggja eina greiða synergieffekt í at hava lesandi í starvsvenjing hjá okkum. Umframt, at næmingar fáa møguleika at skriva serritgerðir við støði í virkseminum hjá Føroya Tele og harvið fáa ítøkiligar virkisroyndir, so uppliva vit ágóðan av, at okkara starvsfólk fáa innlit í nýggja gransking og nýggj ástøði, ið stuðla undir nýhugsan av verandi virksemi.

**Trivnaður hægstu raðfesting**
Í árligu trivnaðarkanningini skorar arbeiðsgleði eitt indeksstig á 78 og trúfesti eitt indeksstig á 85. Hetta merkir, at arbeiðsgleðin og trúfestið hjá starvsfólkum á Føroya Tele er munandi omanfyri miðal á danska arbeiðsmarknaðinum og millum bestu fyritøkur í Norðurlondum. 97% av starvsfólkunum svaraðu kanningini í 2019.

Sannroyndin, at vit liggja so høgt, borgar fyri einum høgum starvsfólkanøgdsemi, sum ikki kemur av sær sjálvum. Miðvísa arbeiðið við trivnaðinum seinastu mongu árini ber nú blóma við sær.

Vit arbeiða áhaldandi við at varðveita og betra enn meira um arbeiðsgleðina. Hetta gera vit millum annað við javnan at raðfesta og samskipa tiltøk, ið samanumtikið leggja lunnar undir vitanardeiling, samstarv og menning.




Arbeiðsgleði

78

Trúfesti

85

Starvsfólk við ársenda í 2019

195

Í lestrarstarv

7

Aldurspenni í samtakinum

16 - 70 ár

Lærlingar innan handil, skrivstovu, KT og datatøkni

10



# Umhvørvi og grønar loysnir

Vit hava øll ábyrgd at verja umhvørvið. Hjá okkum er málið at gagnnýta alt tilfar sum best, at nýta orku skynsamt, at fara væl um okkara øki og at sýna fyrimyndarligan atburð í samfelagnum sum heild.

Støðir runt landið

330

Støðir eru okkara bygningar, tøknihús, tøkniskáp og mastrar runt landið. Vit hava leypandi greiningar av øllum okkara støðum fyri at tryggja skilagóðar orkuloysnir allastaðni. Harafturat hava vit árlig átøk, har ruddað og fríðkað verður innan og uttan um bygningarnar okkara.

Kassar til sundurskiljing

11

Vit gera nógv burturúr, at burturkast verður skilt sundur og koyrt til endurvinningar ella beint burtur so umhvørvisvinarligt sum gjørligt. Í Klingruni hava vit eitt nú ruskrúm við kassum til sundurskiljing og papppressu, umframt at vit uttan fyri bygningin hava byngjur til rúgvusmikið burturkast.

Battaríir runt landið

3.000

Øll okkara útgerð á øllum fjallatoppum og støðum runt landið koyrir við battaríum. Týdningurin av battaríum er, at tey koyra víðari undir streymsliti. Battaríini runt landið verða royndarkoyrd árliga. Um royndirnar ikki vísa tekin um brek, verða battaríini ikki skift út.

kWh er samlaða talið av battaríbankunum

60.000

Battaríini hjá okkum hava ymiskar vektir. Okkara tyngsta battarí vigar **98 kilo**. Tá ið vit leggja fleiri battarí saman, fáa vit ein battaríbanka. Í okkara størsta battaríbanka standa **198 battaríir,** og samanlagt vigar bankin **11 tons**. Um vit legg-ja allar okkara bankar saman, hava vit samanlagt **60.000 kWh.**



# Klingran

## Høvuðssætið hjá okkum gongur á odda, tá ið tað kemur til umhvørvi og grønar loysnir.

**Ljósfølarar**
Klingran er fødd við eini snildari ljósstýring. Bygningurin hevur ongar kontaktir, og ljósið lýsir sostatt einans við ljósfølarum. Hetta merkir, at ljósið lagar seg eftir, um fólk eru í einum rúmi, og hvussu ljósmongdin í rúminum er. Ljósskipanin koyrir so mikið væl, at tað fyribils ikki loysir seg at skifta hana út. Í sambandi við nýggj byggjaríir, ella har grundarlag annars er fyri tí, skifta vit tó til LED.

**Hitastýring**
Hitin og natúrliga útluftingin í Klingruni verða stýrd av bygninsautomatikki (CTS). Áðrenn hitastýringina høvdu vit ein veitingarhita á 79 gradir, men í dag eitur hann 54 gradir. Eftir ætlan fara vit í 2020 at flyta okkum frá natúrligari frílufting til eina hybridluftskipan, sum fer at hava við sær eina enn betri inniluft.

**Fríkøling**
Vit hava skift alla køling í øllum okkara bygningum við fríkøling, so meginparturin koyrir við góðkendum orkusparandi CE-motorum.

Fríkøling merkir, at vit brúka útihitan at køla við heldur enn kompressarakøling. Hetta hevur við sær nógva sparing, tí natúrliga orkan ger, at minni orka verður brúkt uppá at køla. Fríkøling egnar seg væl til føroyska veðurlagið, ið sjáldan fer upp um 20 hitastig.

Upprunaliga vórðu tøknirúmini í Klingruni stýrd av kompressarakøling, men eitt skifti í 2015 til fríkøling og nýtslu av hitapumpu hevði havt við sær, at avlopshitin kann endurnýtast at hita Klingruna við. Yvirskipað hevði skiftið í 2015 við sær eina árliga sparing áljóðandi 500.000 kwt.

**Oljufrí í 2020/2021**
Vit ganga nýggjar leiðir og troyta nýggj økir. Tá ið íløgur verða gjørdar í nýggja útgerð ella bygningar, eru orkunýtsla og burðardygd høgt raðfest.

Í 2020 er ætlanin at skifta hitaloysnirnar í fýra av tøknihúsum okkara til jarðhitaskipan. Í Klaksvík er tó ætlanin at knýta okkum í kommunalu sjóhitaskipanina.

Harumframt fara vit at byggja ein tøknibygning í Miðvági, har vit, heldur enn at hava neyðstreym, fara at royndarkoyra eina brintskipan og eina sólorkuskipan.

Bilaflotin hjá samtakinum skal somuleiðis gerast oljufríur, og í 2020 er ætlanin at hava tilsamans seks el-bilar og løðarar.



# Kundin í miðdeplinum.

**Sterkast av øllum bondum eru tey bond, ið vit menniskju knýta. Hesi bond knýtast best og vara eisini longst, tá ið møguleikin fyri góðum samskifti er til staðar**

Gott samskifti kemur ikki av sær sjálvum.

Tað er okkara uppgáva at røkja og menna eitt so mikið sterkt, skjótt og nútíðarhóskandi samskiftisnet sum yvirhøvur til ber, tí fyri hvønn dag, ið gongur, fær skjótt og svikaleyst samband meiri og meiri at siga; bæði fyri einstaka føroyingin og fyri framburðin í okkara samfelag.

Hóast Føroyar eru staddar úti á opnum sjógvi, so eru vit eitt framkomið samfelag. Vit nýta framkomna tøkni til at knýta bond og at vísa øðrum, hvørji vit eru. At vit eru egin, at vit tora, og at vit eru framsíggin. At vit fegin síggja okkum sum heimsins miðdepil, og at tað er útheimurin, ið skal læra av okkum – ikki øvut.

Hongur sostatt alt á netinum, sum bindur okkum saman, í síðsta enda? Nei, tí kundarøkt og nærverandi samskifti er fortreytin fyri, at alt annað hongur saman.

## Nærverandi samskifti

Sum veitari av samskiftistøkni er tað týdningarmikið fyri okkum, at vit ganga undan í kundarøkt og nærverandi samskifti. At onnur læra av okkum. Vit gera okkum tískil stóran ómak at tæna og kenna hvønn tann einasta kunda, sum var hann einsamallur í allari verðini.

Hjá okkum ræður tað um at knýta bond við kundan, so at møguleikin fyri góðum samskifti er til staðar. Hetta gera vit við nærveru, áliti og at seta kundan í miðdepilin í øllum okkara virksemi.

Alt skal vera so ómakaleyst fyri kundan sum yvirhøvur til ber.

Nærverandi kundasamskifti er at lurta og skilja. At hugsa í loysnum ístaðinfyri at oyðsla við orðum, soleiðis at hvør tann einasti kundi fær ta bestu tænastuna. Tað ræður um at veita trygd fyri, at okkara kundar hava álit á okkum og kenna seg tryggar, tá ið teir brúka okkara vørur og tænastur.

## Álit og menning

Fyri okkum er tað umráðandi, at kundar hava álit á okkum. At teir føla seg tryggar, sæddar og hoyrdar, tí hetta hevur eina jaliga ávirkan upp á okkara førleikar. At vit skapa einfaldar loysnir, sum kundin fær gleði av, tí fortreytin fyri ómaksloysi er, at fólk við góðum førleikum hvønn dag gera sær ómak at taka ábyrgd og at slóða fyri framtíðini.

Tað er tí, vit eru her.

## Kundanøgdsemi í tølum

Á hvørjum ári leggja vit nógv arbeiði í at varðveita og økja um kundanøgdsemið. Hetta verður gjørt við støði í eini árligari kundakanning, ið gevur okkum eitt týðiligt innlit í tørvin hjá einstaka kundanum.






Nøgdsemi og Trúfesti eru máld við útgangsstøði í EPSI-støði (European Performance Satisfaction Index).



# Árið, ið fór...

**Samskiftistøkni er umráðandi, men samfelagstilvit er so nógv meira. Vit menniskju eru ein sosial vera, og tískil ræður tað um at liva í samfelagi við onnur og geva sítt íkast og luttaka í viðurskiftum, ið hava týdning. Í 2019 vóru millum annað hesar hendingar á breddanum.**




## Íverksetan á breddan

Sum høvuðsstuðul hjá Íverksetarahúsinum eru vit við til at styrkja nýhugsan og íverksetaraumhvørvið í Føroyum.

Samstarvið við Íverksetarahúsið er ein viðkomandi háttur at stuðla framburðinum í samfelagnum.

Vit halda, at Føroyar hava tørv á nógvum íverksetarum og fleiri vinnuligum beinum at standa á. Umframt at skipa fyri FT Game-Jam hava vit eitt aktivt samstarv við Íverksetarahúsið um fleiri viðkomandi tiltøk.

## Samband á Víkum

Tað eru eftir hondini fá støð í Føroyum, har ið einki fartelefonsamband er. Eitt av fáu støðunum hevur tó verið á norðsíðuni í Vágum og norð móti Saksun.

Umframt at tæna vinnulívinum í økinum, nær nýggja sambandið eisini til Vestmannabjørgini, ið er sum kunnigt eitt tað mest vitjaða ferðamálið í Føroyum.









## Nýggjur samskiftispallur til løgregluna

Gamla samskiftisskipanin hjá løgregluni við radiobylgjum hevur nú tænt fyri seg.
Í næstum fær løgreglan ein spildurnýggjan samskiftispall at standa á.

Nýggja skipanin er slóðbrótandi í tann mun, at hon verður bygt oman á 4G-netið hjá okkum, er talgild og krypterað.

Skipanin verður sostatt grundarlagið undir tilbúgvingini hjá løgregluni, og við tíðini kann hon gerast grundarlagið undir allari tilbúgving

## Pól og fjøllini

Allir føroyingar kenna eftir hondini Pól Sundskarð. Vit fylgja honum og taka hann við í okkara arbeiði at menna dekningin á okkara farneti úti í føroysku náttúruni.

Hesum kann Pól hjálpa okkum við, tí eins og hann vil ganga á odda og gera spor til onnur at stíga í, er tað okkara aðalmál at ganga á odda í føroyska framburðinum og slóða fyri einfaldari og framkomnari samskiftistøkni.





## Spora seyðin

Í 2019 kom Spora. Eitt produkt, ið er ætlað landbúnaðinum og teimum, ið hava kríatúr sum vinnuveg.

Í fyrstu atløgu fingu seyðabóndur atgongd til produktið, so at teir vórðu knýttir nærri seyðinum upp á ein ómakaleysan og framkomnan hátt á fartelefonini og telduni.




## Høvuðsstuðul hjá e-landsliðnum

Saman við Fótbóltssambandi Føroya varð hol sett á e-fótbólt í Føroyum. Hetta hendi í kjalarvørrinum av nýggju fótbóltskappingini hjá evropeiska fótbóltssabandinum, eEURO2020.

Fótbóltssøga varð skrivað, og fyri fyrstu ferð vórðu funnir tveir føroyskir e-landsliðsleikarar, ið skulu umboða Føroyar.




## Nýggj Telebúð á flogvøllinum

Tað er týdningarmikið fyri okkum, at vit kunnu møta kundanum júst har, sum hann hevur tørv á okkum.

Tað var við hesum í huga, at vit lótu eina stásiliga, nýggja Telebúð upp á flogvøllinum, eftir at vit í nøkur ár høvdu samstarvað við Visit Vágar um eina avgreiðslu á flogvøllinum.

Nýggja Telebúðin er væl móttikin og kemur bæði vágafólkum og teimum mongu ferðafólkunum, ið ferðast umvegis flogvøllin, til gagns.




## Avtala við Samsung

Fyri okkum hevur tað nógv at siga, at vit sleppa inn um dyrnar hjá "teimum stóru". Samsung er ein risi á telemarknaðinum saman við Apple og Huawei, og í mai 2019 fingu vit eina strategiska avtalu í lag við Samsung, samstundis sum vit frammanundan eru eitt góðkent Apple-verkstað.

Avtalan við Samsung gevur okkum skjóta at-gongd til teirra vørur, og harvið kunnu vit veita eina betri kundauppliving.

# Halló 5G

5G verður mett at vera grundarlagið undir framtíðar talgilda samfelagnum, og í 2019 fóru fyrireikingarnar til nýggju 5G-tøknina av álvara av bakkastokki.

Fyribils hevur 5G verið royndarkoyrt innanhýsis í høvuðssætinum í Hoyvík.

Ætlanin er at rulla 5G út um alt landið, og fleiri kollveltandi broytingar standa fyri framman.

**Halló 5G, halló framtíð**.





# Børn og skíggjar

## Tiltak í Klingruni saman við Kvinnu

Tøknin hevur gjørt innrás í lív okkara, og samstundis sum tað hevur ment samfelagið, hevur tað eisini sínar eyðsýndu avbjóðingar; serliga, tá ið talan er um børn, sum í stóran mun vaksa upp við einum skíggja frammanfyri sær.

Saman við Kvinnu settu vit hetta á breddan og spurdu, hvussu vit bera okkum at - foreldur so væl sum alt samfelagið. Í felag skipaðu vit fyri einum stórum temakvøldi í høvuðssæti okkara í Hoyvík, samstundis at vit gjørdu eina greinarøð um sama evnið í blaðnum hjá Kvinnu.

Á temakvøldinum greiddi Ann Mari Petersen, námsfrøðingur, frá avleiðingum, ið kunnu standast av ov nógvari skígjanýtslu. Eva Skeel Nolsø, ið er HR- og marknaðarstjóri, greiddi frá, hvussu hon stýrir skíggjanýtsluni hjá børnunum niður í minsta minutt, og at enda gav Elin Michelsen innlit í barnavinaligar appir.

## Manfred Spitzer um skíggjanýtslu

Hvørji árin og hjáárin eru av skíggjanýtslu, og hvussu ávirkar skíggjanýtsla heilsu, útbúgving og samfelag? Henda spurningin svaraði heimsgitni týski heilagranskarin, Prof. Dr. Manfred Spitzer, upp á, tá ið skipað varð fyri tiltaki saman við Gitte Klein, ið er stovnari av fyritøkuni Grit – positiv sálarfrøð

Fyrilesturin við Manfred Spitzer var granskingargrundaður og provokerandi við støði í hansara gransking av heilanum; hvussu menniskjan lærir, hvussu tónleikur og ítróttur mennir heilan, og hvussu talgildir miðlar ávirka innlæring og uppmerksemi.

Við støði í fyrilestrinum hjá Manfred Spitzer varð eisini skipað fyri pallborðskjaki. Tøknin er komin fyri at vera, og tey fægstu kunnu ímynda sær eina tilveru uttan skíggjar. Hetta kjakaðust Manfred Spitzer, Gitte Klein, Magni Mohr, Hanna Jensen og Susanna Olafsdóttir Skaale um. Heini í Skorini var orðstýrari.



# VerSumHeima

# í 83 londum og oyggjum

Verðin er stór, men við VerSumHeima er hon tó so lítil. Føroyingar ferðast nógv, og at ferðast skal vera so ómakaleyst sum yvirhøvur til ber. Tænastan VerSumHeima er slóðbrótandi, og í 2019 varð hon bygt út við fýra nýggjum londum.

Tey vóru Avstralia, Indonesia, Suðurkorea og Tailand.

Alaska
Albania
Amerikansku
Jomfrúoyggjar
Andorra
Asorurnar
**Avstralia**
Áland
Belgia
Bosnia Hersigovina
Bulgaria
Danmark
Estland
Eysturrík
Finnland
Frankaríki
Fronsku Guiana
Gibraltar
Gotland
Grikkaland
Grønland
Guadeloup
Guernsey
Hawaii
Holland
Hvítarussland
Ibisa
**Indonesia**
Isle of Man
Isle of Wight
Italia
Írland
Ísland
Ísrael
Jersey
Kanada
Kanarisku Oyggjarnar
Kekkia
Kina
Kosovo
Kreta
Kroatia
Kýpros
Lettland
Liktinstein
Litava
Luksemborg
Madeira
Makedonia
Malta
Mallorka
Martinique
Minorka
Moldova
Monako
Montenegro
Norðurírland
Noreg
Ongland
Portugal
Pólland
Puerto Riko
Rodos
Rumenia
Russland
San Marino
Sardinia, Serbia
Sisilia
Skotland
Slovakia
Slovenia
Spania
**Suðurkorea**
Svalbard
Sveis
Svøríki
**Tailand**
Turkaland
Týskland
Ukraina
Ungarn
USA
Wales




Apple við føroyskum knappaborði
Tað hevur leingi verið okkara hjartamál at fáa føroyska málið inn í Apple-tól, so tað er eins lætt at skriva á føroyskum sum á øðrum málum.
Vit hava arbeitt miðvíst, og eftir drúgt samskifti við fleiri ymiskar deildir hjá Apple, umframt viðkomandi fólk í eitt nú danska Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, er hetta nú ein veruleiki.




# Sona í støðugari menning

## Á vári 2018 menti Føroya Tele fjøltænastuna Sona sum ein avloysara til gomlu nummartænastuna Nummar.fo og telefonbókina.

Endamálið við Sona er ikki bara at veita telefonnummur, men at savna alskyns hentar upplýsingar á einum og sama stað.

Meðan heimasíðan Sona.fo er nummartænasta burturav, er Sona appin ein fjøltænasta við fleiri ymiskum hentleikum. Bæði appin og heimasíðan vóru í støðugari menning í 2019.  Sona.fo varð dagførd við nýggjum sniði, betri leitifunku og við møguleikum fyri víðkaðum leitingum.

Hagtøl vísa, at Sona er ein tænasta, ið føroyingar fegnast um.

Við ársenda varð greitt, at 25.400 føroyingar høvdu tikið appina niður, og at tað í miðal vóru 19.000 dagligar leitingar bæði á appini og heimasíðuni.

Í 2019 førdi áhaldandi menningin við sær, at føroyingar fingu atgongd til fleiri fjølbroyttar hentleikar á appini. Umframt vælumtóktu fótbóltstippikappingina samstarvaði Sona við eitt nú What's On, G! festivalin, Summar Festivalin og Magn um at veita burðardygga og smidliga tænastu.




## Betri Deildin beinleiðis í Televarpinum

Í 2019 fóru Televarpið og Fótbóltssamband Føroya undir samstarv at senda Betri Deildina hjá monnum beinleiðis í Televarpinum, men samstarvið heldur fram í 2020. Talan er um eina tænastu, ið føroyingar nær og fjar fáa ágóðan av.

Fótbóltsdystir vórðu sendir á Rás1 og tvørtum hyggjarapallarnar hjá Televarpinum. Í hesum føri varð Rás1 víðkað við 4 eyka rásum, ið allar vórðu tøkar á appini og netvarpinum.

R1 R2 R3 R4 R5



## Televarpið og ÍSF

Í 2019 gjørdist Televarpið samstarvsfelagi hjá Ítróttasambandi Føroya. Endamálið við samstarvinum, sum eisini er galdandi fyri 2020, var at senda føroyskan ítrótt beinleiðis á Rás1 og talgiltu netrásunum á appini og netvarpinum.

Áhugin fyri øllum ítrótti er stórur í Føroyum, og tað er tí av stórum týdningi, at limafeløgini undir sersambondunum hjá ÍSF hava møguleik at senda beinleiðis frá útvaldum ítróttatiltøkum.

Televarpið



Á Føroya Tele síggja vit tað sum okkara skyldu at vera tilvitað um samfelagið, vit liva í. Vit meta, at besti háttur at stuðla framburðinum í samfelagnum er at taka skynsamar avgerðir, sum stuðla okkara kjarnuvirksemi.

Samfelagstilvit er væl og virðiliga arbeitt inn í kjarnuvirksemið, og til hetta fáa vit íblástur frá FN Global Compact og Heimsmálunum til at skipa virksemi og átøk.

Harumframt draga vit viðkomandi áhugabólkar inn í arbeiðið og eru fegin um alla afturboðan frá starvsfólkum, kundum og øðrum áhugabólkum.

Hetta er við til at styrkja okkara samfelagstilvit.